Porno eisini gott

RULLANDI REDAKTIÓNIN

Myndir: Jens Kristian Vang
Or›: Dánjal Højgaard og Høgni Mohr

Napoleon Hansen, Kioskin vi› Toftagjógv á Toftum:

– Pornoblø› eru so ymisk. Eitt bla› sum Rapport kann sum einki seljast. Men nógv anna› er ov óveruligt og andstyggiligt.

– Eg haldi, at pornografilógin væl kundi veri› broytt. Sjómenn spyrja ofta eftir slíkum blø›um, og eg vænti, at man kundi selt nokk so fitt av teimum. Ta› ávirkar ikki moralin hjá fólki, bara smábørn ver›a hildin burtur frá tí, so er í lagi.

– Vit eiga at minnast til, at nógv, sum ver›ur sent í sjónvarpi er nógv vemmiligari enn porno. Fólk ver›a sprett upp, og ta› er ikki ólógligt.

– Eg hev›i heilt vist selt minst líka nógv Rapport, sum Ude og Hjemme. Toftafólk høvdu væl tora› at keypt sær eitt slíkt bla›. Men summi høvdu fingi› ilt av tí. Missiónin er sterk her, og eg veit ikki, hvussu hon taklar slíkt.

Napoleon er púra ósamdur vi› tey sum siga, at sjómenn hava tiki› ska›a av at pornoblø›um ella bókum.

— Teir grinu at einum sjómanni, sum var so forferdiliga forliptur í einari av hesum bókum. Tá i› skipi› kom heim aftur, leyp hann í land og ni›an til konuna, og so nógv stó› á, at hann hev›i ikki tí› at binda skipi›.

– So okkurt gott er eisini í tí...

Oy›ileggur moralin

Í handlinum Hjá Pidda á Toftum stendur eigarin, Hanus Lómstein. Hanus heldur, at porno eigur at vera forbo›i›, tí hann sigur seg sjálvur hana sæ› hvussu pornoblø› kunnu oy›ileggja moralin hjá monnum:

– Eg havi veri› sjóma›ur fyrr og havi sæ›, hvussu mennirnir hava ligi› og gotta sær vi› tí! Og so koma teir í skúrin aftur, og tú fært teir ikki at tosa anna› prát, fornuftigt prát, sigur Hanus.

– Ta› haldi eg er gali›. Ta› er so nógv anna› at tosa um enn um naki› konufólk og ta› seksuella. Skulu vit byggja okkara lív uppá seksualitet, so er ta› grúiliga fátækt.

Fólk hava brúk fyri strongum lógum, heldur Hanus og sigur, at eitt bla› sum Se & Hør ikki hev›i fingi› innivist í hansara handli.

Hanus vi›gongur, at ta› kann tykjast dupultmoralskt, at samfelagi› ø›rumegin bannar porno í sølubú›ununum, men hin vegin einki ger vi› porno í sjónvarpi og á internetinum.

– Tú kanst altí› skrúva fyri sjónvarpinum, um ta› er okkurt har, sum tær ikki dámar. Eg hoyri tey siga, at ta› er frítt á internetinum, og ta› haldi eg kann gera okkum stóran ska›a. Eg vildi ynskt at mann eisini kundi ste›ga tí.

Forbo› eru vandamikil

Í handlinum Fa. Esmar Olsen í Hósvík stendur eigarin Jóannes Olsen. Persónliga heldur Jóannes, at porno eigur at vera meira ella minni frítt. Men sjálvur hev›i hann ikki selt pornoblø› í sínum handli:

– Eg tími bara ikki at forarga teir gó›u gomlu kundarnar. Teimum hev›i ikki dámt ta›, sigur hann.

– Eg haldi, at mann skal hava loyvi at selja hatta í Føroyum. So mugu handilsfólkini sjálvi velja um tey vilja selja ta›, sigur Jóannes, sum óttast fyri at forbo›slógirnar sláa bakk:

– Ta› nyttar einki vi› forbo›slógum. Ta› kann vera hassj, brennivín ella smuggling. Ta› ver›ur bara spennandi hjá summum, tá i› ta› er forbo›i›.

– Ta› var forbo› fyri at selja brennivín, men ta› elvdi bara til heimabrygging, spritt og alt møguligt, ávarar handilsma›urin í Hósvík.

N‡ti› hugflogi›

Í kioskini á bensinstø›ini í Skálabotni stendur Diana Joensen. Diana arbei›ir bert í kioskini, men stó› ta› til hana vóru pornoblø› óney›ug, tí tey als einki hava vi› veruleikan at gera.

– Hetta er frástoytandi. Gamaní hava fólk atgongd til mangt, men eg dugi ikki at síggja, hví mann skal fara út á allar geilar vi› hesum, sigur hon, tá i› hon bla›ar ígjøgnum bla›i› vi› teimum nøsku myndunum.

Diana ásannar, at moralurin er nógv broyttur sí›ani 1930, tá i› pornografiforbo›i› kom. Hinvegin heldur hon, at frílyndi eisini hevur tiki› yvirhond.

– Alt blívir bara meira og meira »nattúrligt«. Konufólk saman vi› konufólki. Mannfólk saman vi› mannfólki. Ta› er ke›iligt, at ta› er komi› so langt, at vit bara skulu gó›taka alt, sigur Diana Joensen, sum heldur, at fólk mugu eisini brúka sítt egna hugflog.

– Hvør einstakur hevur sín tørv og sítt egna hugflog. Ta› n‡tist okkum ikki at hava slík blø› til, slær hon fast.

Kundarnir r‡ma

Í Handlinum hjá Haraldsen í Fuglafir›i stendur Kristian Suni Jensen, vanliga nevndur Bassi.

– Persónliga haldi eg, at ta› má vera hvørjum frítt um tey vilja lesa pornoblø›, men eg ivist í um áhugin er so stórur millum okkara kundar. Teir kundar, sum høvdu komi›, um vit seldu porno, eru ikki kundar, sum vit satsa upp á.

Hvør vil hava porno?

– Fólk í øllum aldri. Men porno hoyrir neyvan til vanligt innkeyp. Eg vænti, at vanligum fólki ikki fer at dáma, at porno liggur frammi í handlinum.

Hev›i tú ikki kunna› havt ta› undir diskinum?

– Nei. Lógin skal vera í trá vi› tí›ina, men eg veri› ikki undangonguma›ur á pornoøkinum. Fólk skulu ikki teska sínamillum, at nú er Haraldsen farin at selja pornoblø›. Ta› kann tykjast eitt sindur dupultmoralskt, men eg fari ikki at selja porno.

Stutt eftir samrø›una ringdi Bassi til Sosialin og ba› bla›i› leggja dent á, at hann hvørki sum handilsma›ur ella privatma›ur tók undir vi› porno.

Porno valdast

Í handlinum Vár í Runavík stendur Hans Petur Ellingsgaard. Hann er heldur, at porno kann flokkast í tveir bólkar: Hart og bleytt. Ta› har›a vildi hann ikki selt av ótta fyri at missa kundar.

– Blø› sum Penthouse og Playboy áttu ikki at virka› frástoytandi á nakran. Men hetta er desidera› porno og ta› hev›i eg ikki selt, sigur Hans Petur og bla›ar í tí kulørta bla›num, sum Sosialurin hevur vi› sær, har einki er dult.

Fyri tveimum ella trimum árum sí›ani var politii› í kiosk Vár í Runavík og leg›i hald á júst blø›ini Penthouse og Playboy, sum innihalda myndir av naknum konum.

– Vit gjørdu ta› sum eina roynd, men eftir øllum at døma hevur onkur havt fortre› av tí og hevur melda›. Men ta› undrar meg tann dag í dag, at somu blø› sleppa at liggja frammi í handlum í Havn, sigur hann:

– Ta› er møguligt, at mann átti at linka› forbo›i› so lí›andi, so at naka› av tí bleytara slagnum sleppur fram. Men beinlei›is porno eri eg ímóti, sigur kiosk-eigarin í Runavík fast, sum ikki ætlar sær at vera sló›brótari á á økinum:

– Nei, ta› ætli eg mær bestemt ikki at vera.

Svínarí!

Pornografi er eitt eymt mál í Føroyum. Besta dømi um ta› fáa vit í eini lítlari bygd, har handilskonan sigur sína avgjørdu meining um pornografiina. Men tá avtornar noktar hon blankt at vera vi› í almenna kjakinum um pornografilógina.

Vit hava valt at taka samrø›una vi› kortini fyri at vísa at hetta sjónarmi› eisini er galdandi í kjakinum.

– Ta› hev›i veri› stórt svínarí at selt slíkt, sigur handilskonan.

Hví?

–Tí ta› er mín holdningur!

Er nøkur ávís orsøk til tess?

– Blív ikki vi›!

Er ta› naka› vi›...

– Blív ikki vi›!!! Eg haldi ta› vera virkuliga synd í teimum, sum útstilla seg í slíkum blø›um.

Á alnetinum og í sjónvarpi er porno...?

– Eg avgeri ikki, hvat sjónvørp ella alneti› vísa. Men eg kann velja ikki at selja blø›. Eg fari ongantí› at selja porno. Hvørki undir ella á diskinum!

Er porno ska›iligt?

– Ja, fyri summi.

Hvussu tá?

– Ta› vita tit!

Er ta› ein negativ ávirkan?

– Ja, kanska.

Hvussu tá?

– Ikki blíva vi›!

Men á hvønn hátt ver›ur ein ávirka›ur?

– Ikki blíva vi›!!

Kann ta› elva til brotsverk?

– Ikki blíva vi›!!! Tit vita, hvat ta› elvir til!

Hvat?

– Ikki blíva vi›!

Er ta› skeiv ávirkan?

– Ta› vita tit. Eg selji ikki porno, um so handilin fer á heysin av at lata vera!

Her›i› lógina

Børge Jensen eigur matvøruhandilin C.A. Jensen í Kollarfir›i. Børge er treytaleyst ímóti porno:

– Bekennir man seg til at vera kristin, so er porno skeivt. Bíblian forsvarar ikki »utugt«. Slík blø› eru ska›ilig. Vit hava eina lóg, tí myndugleikarnir skulu halda í nakkan á okkum. Trupulleikin er, at lógin ikki ver›ur handhevja›.

Hevur tí›in ikki yvirhála› lógina nú ta› ber til at síggja allar møguligar óterligheitir á alnetinum og í sjónvarpi?

– Nei. Lógin átti at umfata slíkt eisini. Og syrgjast má fyri, at lógarbrot ikki ver›a framd. Nei, moralurin var nógv fræggari í 30-unum. Man kann ikki fara og bakka bara tí moralurin er farin ni›ur. Mørk munnu vera.

Men kann porno ikki vera eggjandi fyri fólk?

– Jú, kanska.

– *Er ta› ikki gott?*

– Gott? Ta› veit eg ikki.

Kann eitt pornobla› ikki seta fer› á kynslívi› heima?

– Ta› mátti ikki veri› ney›ugt. So er tí› at gevast á hondum!